## Ov skjót at skjóta

Tey seinastu fimm árini hevur danska løgreglan skotið og rakt 23 fólk. Av teimum vóru 16 sálarliga sjúk, og sjey fólk doyðu av skotunum frá løgregluni. Millum fólk hevur ofta verið havt á lofti, at løgreglan er ov skjót at taka skammbyrsuna fram, og tað hevur leiðslan í løgregluni nú eisini sannað. Torsten Hesselbjerg, løgregluovasti, segði í gjár, at løgreglufólk eiga at hugsa seg um eina ferð eyka, áðrenn tey skjóta, tí tað er tann seinasta loysnin.




## Leingja barnburðarfarloyvið

Tað eru ikki bara føroyskir politikarar, sum tosa um at leingja barnsburðarfarloyvið, tí hetta sama evnið verður í hesum døgum umrøtt í íslendska Altinginum. Sum er hava íslendsk foreldur rætt til farloyvi í níggju mánaðir í sambandi við barnsburð, men fleiri av flokkunum vilja hava tað longt til eitt ár. Men sambært bløðunum hava politikararnir tann trupulleika, at barnburðargrunnurin er tómur, tí játtanin fyri 2007 vísir seg at vera alt ov lítil.

# Blíðskapur aftan stongdar dyr á SEV

**- Vit høvdu nógvar sera góðar og væl kvalifiseraðar umsøkjarar, bæði ímillum tey sjey, sum vóru til samrøður, men eisini millum tey 17, sum søktu og ikki vóru til samrøður, sigur Leivur Hansen, stýrisformaður**

ELFELAGIÐ SEV
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í morgun frættist, at Elfelagið SEV fór at kunngera navnið á nýggja stjóranum, sum stýrið hevur sett. Lýst hevur verið eftir nýggjum stjóra, og tilsamans 17 umsóknir vóru komnar til starvið.

Sosialurin fór á dyrnar hjá SEV klokkan gott 9 í morgun, tí vit høvdu frætt, at nýggi stjórin skuldi "presenterast" fyri starvsfólkunum.

Men tað tók sína tíð at sleppa inn í høvuðsbygningin. Tú slapp inn um høvuðsdyrnar, men innara hurðin var stongd. Sosialurin var fyrstur, og síðan komu fólk hjá kappingarneytanum á Hálsi. Meðan vit standa í durinum og bíða, kemur ein blíð kvinna, letur hurðina upp og sigur, at vit mugu ganga inn niðanfyri, tí tað er har, øll eru.

Vit spyrja, hvør nýggi stjórin er, og hon heldur, at tað er ikki dult meira. Maðurin er Hákun Djurhuus, sum í fleiri ár hevur verið stjóri í P/F Føroya Shell.

Vit fara útum og ganga oman til niðaru hurðina, men har er eisini stongt. Vit leita eftir øðrum hurðum, og tá vit ganga framvið vindeygunum í niðastu hæddini, sum vestur suðureftir, síggja vit nógv fólk innanfyri rútarnar – og vit síggja eisini, at Hákun Djurhuus stendur og prátar við einum pappíri í hondini.

Triðja hurðin, vit taka í, er opin, so her er einki annað at gera enn at vera smá framligur og fara beint innar í fólkarúgvuna.

Fólk eru blíð, og Hákun heldur fram at tosa. Vit hoyra, at hann nevnir "globala upphiting" og hugsa, at nýggi stjórin hugsar um umhvørvi.

Tað er gott.

Jú, fólk eru blíð, og okkurt kent andlit heilsar okkum fryntliga. Eingin biðir okkum fara avstað aftur. Vit kenna okkum vælkomin, og vit sleppa eisini at taka tær myndir, vit eru komin eftir.

### 17 umsóknir

Í stuttum práti sigur stýrisformaðurin, Leivur Hansen, okkum, at tilsamans 17 umsóknir vóru til stjórastarvið, og stýrið hevur havt samrøður við sjey av umsøkjarunum.

- Vit høvdu nógvar sera góðar og væl kvalifiseraðar umsøkjarar, bæði ímillum tey sjey, sum vóru til samrøður, men eisini millum tey 17, sum søktu og ikki vóru til samrøður.

Uppá fyrispurning, um nøkur kvinna var millum tey 17, sigur Leivur, at ein var, men stýrisformaðurin vil ikki siga, um hon vann upp til tey sjey, sum vóru til samrøðu.

- Fleiri av umsøkjarunum vóru við heilt fram til endan av viðgerðini um, hvør skuldi setast, og eg vil siga, at tað var ein heildarmynd sum segði okkum, at Hákun Djurhuus er rætti maðurin at mynda Elfelagið SEV.

Leivur Hansen sigur seg onga løtu ivast í, at felagið við Hákuni Djurhuus hevur fingið ein góðan og væl kvalifiseraðan stjóra.

- Hákun fer at hava sína dagligu gongd á SEV longu frá 1. desember, men hann tekur formelt við stjórastarvinum 1. januar 2008, sigur stýrisformaðurin.

Poul Arni Jacobsen, sum annars var næstformaður í stýrinum fyri SEV, hevur verið virkandi stjóri síðan 1. oktober. Í hesum tíðarskeiði hevur hann ikki sitið í stýrinum, og í hansara stað sum næstformaður hevur sitið Jógvan Emil Nielsen.

Poul Arni hevur áður verið stýrisformaður í SEV, og hann tekur við aftur sum næstformaður, tá hann er leysur av starvinum sum virkandi stjóri.

Klokkan 10 í morgun byrjaði umboðsnevndarfundurin hjá Elfelagnum SEV á Hotel Føroyum.



*Tað tók sína tíð í morgun, áðrenn vit funnu eina opna hurð á Elfelagnum SEV, nú nýggjur stjóri er settur og skuldi "presenterast" undan umboðsnevndarfundinum, sum byrjaði á Hotel Føroyum klokkan 10 í morgun*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Hákun skal leiða SEV

**SEV-stýrið hevur sett Hákun Djurhuus í stjórastarvið í Elfelagnum SEV**

EL-FELAGIÐ SEV
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í morgun gjørdi stýrið í SEV av at seta Hákun Djurhuus í starv sum stjóri í SEV frá 1. januar 2008 at rokna.

Hákun er 46 ára gamal. Hann gjørdist sivilverkfrøðingur í 1986 og hevur síðan ognað sær drúgvar starvs- og leiðsluroyndir.

Hann hevur verið stjóri í P/F Føroya Shell í 10 ár – fram til í summar, og undan hesi tíðini starvaðist Hákun hjá A/S Dansk Shell í eitt ár.



*Leivur Hansen, stýrisformaður, Poul Arne Jacobsen, virkandi stjóri og Hákun Djurhuus settur stjóri í SEV frá 1. januar 2008*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Árini 1992-1996 var hann leiðsluráðgevi og stjóri í P/F Northern Fish Cold Storage Ltd. í Klaksvík, og árini 1986-1992 arbeiddi hann sum ráðgevandi verkfrøðingur hjá Landsbyggifelagnum og E.D. Verkfrøði.

Eitt skifti var Hákun føroyskur umboðsmaður hjá Kreditforeningen Danmark, sum seinni broytti navn til Realkredit Danmark.

Hákun hevur eisini royndir í ymiskum nevndararbeiði, er nevndarlimur í Føroya Arbeiðsgevarafelagognevndarformaður í Smyril Line.

Nú hann er settur í stjórastarv hjá SEV, leggur Hákun Djurhuus nevndarsessin í Føroya Arbeiðsgevarafelag frá sær í næstum, men SEV-stýrið hevur góðkent, at hann heldur fram sum nevndarformaður í Smyril Line.

## - Eg skuldi jú víðari

ELFELAGIÐ SEV
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hákun Djurhuus, sum verður nýggjur stjóri í Elfelagnum SEV frá 1. januar 2008, heldur, at hansara útbúgving sum sivilverkfrøðingur og hansara royndir innan leiðslu gjøgnum fleiri ár, er góður førleiki í nýggja starvinum.

- Jú, eg haldi, at hetta verður ein spennandi uppgáva, og eg gleði meg til at taka við starvinum.

Hákun Djurhuus var leysur í starvinum sum stjóri í Føroya Shell fyrr í heyst, og nú stendur henda nýggja avbjóðingin fyri framman hjá honum.

- Vit vóru eini 100 fólk í starvi hjá Føroya Shell, og vit eru eini 140-150 í starvi hjá Elfelagnum SEV. Nýggi stjórin heldur, at hansara tekniski førleiki sum sivilverkfrøðingur og umsitingarligu royndir gjøgnum fleiri ár fara at koma honum til góðar sum stjóri í Elfelagnum SEV.

Spurdur, hví hann søkti starvið, sigur hann:

- Eg segði meg úr starvi hjá Føroya Shell longu seint í vár, men havi verið knýttur at felagnum fram til heystari. Nú var eg leysur, og eg skal jú víðari í lívi mínum. Eg eri glaður fyri, at stýrið í SEV hevur víst mær hetta álit, sigur Hákun Djurhuus.